# Faroe Jet fegnast um kvinnuligan flogskipara

**Jóhan E Simonsen, stjóri í Faroe Jet er glaður yvir nú at kunna hava javnstøðu bæði frammi og afturi í flogfarinum. Sum Sosialurin skrivaði fríggjadagin, so skal 23 ára gamla Kára Dam byrja sum flogskipari hjá Faroe Jet í juli**



*Kára Dam byrjar at flúgva hjá Faroe Jet í juli*

FLÚGVING
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

– Vit eru øguliga glað fyri at hava fingið eina kvinnu fram í cockpittið, sigur stjórin í Faroe Jet, Jóhan E Simonsen.

Kára Dam verður ikki bara fyrsta kvinnan í einum føroyskum cockpitti, hon er eisini yngsti flogskipari hjá Faroe Jet við sínum 23 árum.

Ongin serligur búni er seymaður til Káru, uttan hon fer at hava sama búna sum mannfólkini.

– Tað verður so sjálvandi upp til hana sjálva at gera av, um hon vil hava turriklæð ella slips um hálsin, sigur Jóhan E Simonsen.

Tá Kára byrjar at flúgva í juli verður hon stýrimaður. Fyri at gerast skipari skal ein hava 2.000 flúgvitímar í skjáttuni, og tað hevur Kára ikki.

Jóhan E Simonsen væntar ikki at ein kvinnuligur flogskipari fer at hava nakra negativa ávirkan á Faroe Jet.

– Fólk í Føroyum og herumkring vita, at tað ikki er hárlitur, støðd og kyn sum hava nakað at siga, men dygdin sum persónurin hevur víst.

# Faroe Jet ynskir sær fleiri ferðafólk

**Stjórin í Faroe Jet, Jóhan E. Simonsen, letur væl at gongdini hjá Faroe Jet, men hevði fegin vilja havt fleiri ferðafólk umborð á Sólju, sum flogfarið eitur.**

**– Um eg skal rokna leysliga, so eru flogførini í miðal hálvfull, sigur hann**



*Jóhan E. Simonsen, stjóri í Faroe Jet*

FLÚGVING
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Nýggja føroyska flogfelagið hevur nú verið á flogið í eitt sindur meira enn ein mánað.

Í fjølmiðlum hevur seinastu vikuna staðið, at bara átta fólk vóru við á einum túri hjá felagnum. Hetta váttar stjórin, Jóhan E. Simonsen, men sigur at ferðafólkatalið eisini hevur verið uppi á 70 ferðafólkum.

– Sjálvandi høvdu vit ynskt okkum eitt fult flogfar allar túrar, men nógv fólk hava bílagt sær ferðaseðlar áðrenn vit vóru til, og tí eru tað ikki so nógv sum flúgva við okkum enn.

Í byrjanini var bara gjørligt at keypa ferðaseðlan gjøgnum ferðaskrivstovur, men nú er hetta broytt til at eisini lata seg gera á heimasíðuni hjá Faroe Jet.

– Jú, fólk hava funnið til síðuna hjá okkum, og sølan av ferðaseðlum gongur væl, sigur Jóhan E. Simonsen.

Fyri at virksemið skal mala væl runt, skal flogfarið verða fult til 70 prosent. Higartil liggur tað talið um 50 prosent.



*Strúkarar frá Tórshavnar Musikkskúla høvdu konsert fríggjakvøldið*

# Vælljómandi strúkarakonsert

**Fríggjakvøldið hevði eldra strúkaraorkestrið í Tórshavnar Musikkskúla konsert í Listaskálanum. Fitt av fólkið var komið at lurta, og ikki kann sigast annað enn, at tað gjørdist eitt frálíkt kvøld við sera dugnaligum tónleikarum**

TÓNLEIKUR
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Tónleikur eftir millum annað Händel, Bach, Mozart og Schuberg var framførdur. Tíggju ung fólk í aldrinum 15-20 ár spældu violin og cello. Fimm gentur og fimm dreingir. Leiðarin fyri strúkarararnar er Bernharður Wilkinson, og hann var meira enn nøgdur við næmingarnar aftan á konsertina.

– Tey kláraðu tað avbera væl, tey høvðu ongan dirigent, so tað var ein sera krevjandi konsert, segði hann.

Stykkini, sum tey spældu vóru ógvuliga torfør at spæla, og nógv hevur verið vant áðrenn konsertina Næmingarnir sjálvir vóru sera nøgdir og nevndu orð sum »alletiders« og »betri enn nøgd«, tá tey vóru spurd um hvussu tey hildu tað hevði gingið.

## STUTT SAGT

### Salmonella í sjokulátu

Sjokulátufyritøkan Cadbury hevur tikið miljónir av sjokulátu av handilshillunum í Bretlandi. Vandi er fyri at tær innihalda salmonellu. Tó er hendan sjokulátan ikki útflutt til onnur lond enn Stóra Bretland og Írland, so føroyingar kunnu trygt eta kremegg og annað gott frá Cadbury.

Seinastu tríggjar mánaðirnar hava 45 fólk havt akkurát hetta slagið av salmonellu, ið kann vera í Cadbury sjokulátuni. Fyritøkan hevur vitað um at salmonella-smittan kundi verið í sjokulátuni, men sigur at tey hava bíðað eftir úrslitinum av kanningini frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni í Bretlandi, skrivar Daily Mirror.

Cadbury fær nú nógvar atfinningar fyri at hava bíðað í fleiri mánaðir frá tí at fyrsta ávaringin um salmonella kom, til tað at fyritøkan tók sjokulátuna av handilshillunum.

Sjokuláturnar, sum nú er tiknar úr handlinum eru hesar:

250g Dairy Milk Turkish, Dairy Milk Caramel og Dairy Milk Mint, Dairy Milk 8 chunk, 1kg Dairy Milk, 105g Dairy Milk Buttons Easter Egg og 10p Freddo bar.

**inna**

### Nýggjur Frítíðarskúli í Hoyvík

Eftir summarfrítíðina letur nýggi Frítíðarskúlin í Hoyvík upp. Stovnsleiðari er Levi Mørk, og hann greiðir frá, at dentur verður lagdur á ítróttarligt og skapandi virksemi, bæði innan- og uttandura.

Frítíðarskúlin hevur møguleika at brúka tvær skúlastovur og fimleikahøllina hjá Hoyvíkar Skúla og eisini Hoyvíkshøllina. Børnini kunnu vera í frítíðarskúla frá kl. 10.30 til 17.00.

Nýggi Frítíðarskúlin er í tveimum hæddum. Í ovaru hæddini skulu skúli og frítíðarskúli vera, og í niðaru hæddini heldur frítíðarskúlin mest til. Annars vera hølini brúkt saman við skúlanum, tá tørvur er og pláss er fyri tí. Tað vera pláss fyri 126 børnum úr 1. og 2. flokki.

### Soppaeitur í mjøli

Í ávísum sløgum av rugmjøli og øðrum mjølblandingum er soppaeitrið Ocharatoxin A funnið. Tað eru millum annað kendu sløgini Amo, Schulstad og Safir. Heilsufrøðiliga Starvsstovan mælir fólki til at ikki brúka mjølið, men lata tað inn til handilin aftur.

Ocharatoxin A er íkomið orsakað av soppavøkstri í korninum, áðrenn tað er malið til mjøl. Mest loyvda mongd av eitrinum er 3 mg per kilo, og ávíst í hesum mjølinum er 9 mg per kilo.

Eiturið kann elva til nýraskaðar um tað verður etið gjøgnum longri tí.

Yvirlit yvir vørurnar, sum ikki skulu brúkast er at finna á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni www. hfs. fo

**inna**

### EFTA-ráðharrar viðgera føroyska áhugan í dag

Uttanríkisráðharrarnir í EFTA-londunum halda fund í Íslandi í dag og í morgin. Í dag hittust uttanríkisráðharrarnir í EFTA-londunum í Höfn á Hornafitði í Íslandi. Íslendski uttanríkisráðharrin, Valgerður Sverrisdóttir, er vertur, tí Ísland hevur formansskapin í EFTA í løtuni.

Fleiri mál eru á skránni á fundinum, og sambært Morgunblaðnum skulu ráðharrarnir eisini tosa um áhuga føroyinga fyri limaskapi í EFTA. Landsstýrið hevur boðað EFTA frá áhuganum, og Jóannes Eidesgaard, løgmaður, hevur fyri stuttum verið í Liktinstein og Sveis og tingast við myndugleikarnar har um møguleikar føroyinga fyri limaskapi.

**árni**